# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29.juni 2022 |
| Mál nr.: | 21/11478 |
| Málsviðgjørt: | AH/JN |
| Ummælistíð: | 29. juni 2022 til 20.juli 2022 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**prístalsjavning av lestrarstuðli í tíðarskeiðnum 1. august 2022 til 1. august 2023**

Við heimild í § 19, stk. 2 í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Prosentvísa broytingin í miðalprístalinum fyri undanfarna ár 2020 í mun til miðalprístalið fyri árið frammanundan 2021 er 2,7%.

**§ 2.** Studningurin til teirra, ið taka hægri lestur ella førleikagevandi útbúgving er kr. 4.605 mánaðarliga, sbr. § 7, stk. 2 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Studningurin til teirra, ið lesa á miðnámi ella í fólkaskúla er kr. 4.073 mánaðarliga, um tann lesandi er forsyrgjari ella kann skjalprógva útreiðslur av egnum bústaði, sbr. § 7, stk. 3 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Studningurin til teirra, ið ikki eru fevnd av § 7, stk. 2 ella 3 í løgtingslógini, og annars lúka treytirnar fyri at fáa lestrarstuðul, er kr. 1.962 mánaðarliga, sbr. § 7, stk. 4 í løgtingslógini.

**§ 3.** Lestrarlán sbrt. § 8 í løgtingslógini kann í mesta lagi vera kr. 2.583 um mánaðin.

**§ 4.** Bókastudningur sbrt. § 10 í løgtingslógini er kr. 3.887.

**§ 5.** Vistarhaldsstudningur sbrt. § 11 í løgtingslógini er kr. 2.716.

**§ 6.** Barnastudningurin sbrt. § 12, stk. 2 í løgtingslógini er mánaðarliga kr. 1.067 fyri hvørt barnið undir 18 ár.
*Stk. 2.* Studningurin til einsamallar uppihaldarar sbrt. § 12, stk. 4 í løgtinglógini er kr. 1.636 um mánaðin.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2022.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, dagfesting 29. juni 2022

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen